ATLANTIC AIRWAYS

Sørvágur, tann 27. februar 2018

## Útboð av grannskoðanini hjá Atlantic Airways

Við hesum verður grannskoðanin av P/F Atlantic Airways boðin alment út. Útboðið fevnir um grannskoðan av ársroknskapunum fyri árini 2018-2022, har 2018 verður sæð sum eitt royndarár.

Útboðið fevnir um:

- Grannskoðan av ársfrásøgn
- Grannskoðan av KT trygd

Atlantic Airways miðar eftir at hava ein veitara av váttanaruppgávum fyri felagið. Vit tilskila okkum tó rættin til at velja ymiskar veitarar til ymsu uppgávurnar, ið bodnar verða út. Í tann mun, at ein tilboðsgevari ikki hevur førleikar til at loysa allar útbjóðaðu uppgávurnar, skal tilboðsgevarin vísa á loysnir, ið tryggja, at uppgávan verður loyst á nøktandi hátt.

## Útboðstilfar

Útboðstilfar verður latið tilboðsgevarum í trúnaði og má bert nýtast í samband við hetta tilboðið. Tilboðsgevarar, eins og øll starvsfólk hjá tilboðsgeveranum, sum skulu arbeiða við tilfarinum, skulu skriva undir trúnaðaravtalu. Tey feløg, ið ynskja at lata inn tilboð, verða biðin um at venda sær til Niels Mortensen, nevndarformann felagsins á telefon 216928 ella á telduposti niels@atlantic.fo.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið skal fevna um hesar upplýsingar:

- Lýsing av grannskoðanarfyritøkuni, herundir stødd, bygnað, útbúgvingarstig og royndir, eina og tilvísing til aðrar grannskoðanaruppgávur á líknandi torleikastigi
- Gjøgnumskygnisfrágreiðing, herundir niðurstøðu frá uttanhýsis góðskueftirliti
- Navn og CV fyri undirskrivandi grannskoðara
- Navn og stutt lýsing av toymi, herundir útbúgving og viðkomandi royndir
- Navn og stutt lýsing av KT-grannskoðara, herundir útbúgving og viðkomandi royndir
- Lýsing av grannskoðanartilgongd
- Kostnað, útgreinað á væntaða tíðarnýtslu á ymisku økini
- Tímaprísur fyri aðrar tænastur, ið møguliga kunnu koma afturat grannskoðanini

### Vekting av tilboðnum

Innkomnu tilboðini verða vektað eftir góðsku, prísi og arbeiðshátti.

- Prísur vektar 80%, har mett verður um árliga prísin fyri grannskoðanini, umframt tímaprísin á øðrum arbeiði
- Góðska vektar 20%, har mett verður um førleikar hjá veitara og teimum starvsfólkum, ið verða knýtt at uppgávuni, herundir útbúgvingar og royndir

**Spurningar og freistir**
Útboðið er kunngjørt á Keypsportalinum týsdagin 27. februar 2018. Tilboðsgevarar kunnu seta spurningar um útboðið til og við fríggjadagin 9. mars kl. 16:00. Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til Niels Mortensen á niels@atlantic.fo. Spurningar verða síðani svaraðir í seinasta lagi mánadagin 12. mars. Eftir nærri avtalu kunnu tilboðsgevarar koma á fund fríggjadagin 9. mars við umboð fyri Atlantic Airways, har høvi verður at seta spurningar.

Tilboðini frá tilboðsgevarunum skulu vera Atlantic Airways í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 19. mars kl 10:00.Vinnarin av útboðnum verður kunngjørdur á Keypsportalinum 23. mars 2018.

Vinarliga

**Atlantic Airways P/f**

*Niels Mortensen, Nevndarformaður*